# Nýggi Smyril seinkaður í tríggjar vikur

**Verður hann seinkaður meiri enn ein mánað, skal skipasmiðjan betala landskassanum endurgjald og í løtuni arbeiða 300 fólk uppá skipið fyri at fáa tað liðugt**

NÝGGI SMYRIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Verður nýggi Smyril seinkaður stórt meiri enn hann longu er, kemur skipasmiðjan undir endurgjald til landskassan sum er milliónaupphædd um mánaðin*

Skipasmiðjan í Spania, sum byggir nýggja Smyril, klárar ikki at levera skipið til avtalaðu tíðina.

Tað fekk Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni at vita á fundi í Spania í farnu viku.

Avtalan var, at nýggi Smyril skuldi handast Strandferðsluni tann 12. oktober.

Men á fundi við skipasmiðjuna fekk strandferðslustjórin at vita, at frá Skipasmiðjuni, at hetta megnaði hon ikki og at hon tíð hevði verið noydd at leggja eina nýggja tíðarætlan.

Nú hevur Skipasmiðjan ásett, at nýggi Smyril skal handast Strandferðsluni 30. oktober, ella 18 dagar seinni enn upprunaliga ætlað.

Men afturfyri, so væntar Kristian Daviden eisini at fáa skipið tá.

Hann sigur, at í sáttmálanum hevur Skipasmiðjan tryggjað sær, at hon hevur 30 dagar at leypa uppá, uttan at tað fær avleiðingar.

Men hevur Skipasmiðjan ikki levera skipið í seinasta lagi 12. november, skal hon betala landskassanum endurgjald.

Stjórin á Strandferðsluni er ikki heilt greiður yvir, hvussu stórt hetta endurgjaldið er, men hann veit, at talan er um milliónaupphæddir um mánaðin.

– Sostatt hevur skipasmiðjan eisini rættiliga stóran áhuga í at levera skipið til tíðina, sigur hann. Samstundis hevur Strandferðslan eisini gjørt Skipasmiðjuni greitt, hvussu stóran týdning tað hevur, at skipið verður leverað til tíðina.

Og hann sigur, at skipasmiðjan hevur eisini sett rættiliga nógva ferð á arbeiðið fyri at fáa nýggja Smyril lidnan.

– Nú er byggingin komin so langt, at nógv ymisk arbeiði kunnu verað ísenn í samband við innrætting og í samband við innleggingar av ymsum slagi.

Og nú eru tað ikki færri enn 300 fólk, sum arbeiða uppá nýggja Suðuroyarskipið. Og tey arbeiða eina stóran part av degnum, tí summi arbeiða í tveyskiftisvaktum og onnur arbeiða enntá í trýskiftisvaktum. Tað merkir at í summum førum verður arbeitt alt samdøgurið.

Og Kristan Davidsen sigur, at handverkið er sera snøgt.

– Tað verður eitt ómetaliga snotuligt og vakurt skip, vit fáa til landið, sigur hann.

### Vænta ongar avleiðingar

Herfyri kom fram at spanska skipasmiðjan skuldi betala spanska landskassanum heilar fýra milliardir aftur, sum hon hevði fingið í ólógligum stuðuli.

Kristian Davidsen sigur, at hetta var ikki á skránni á fundinum fyri skipasmiðjuna, men at hann kortini loyvdi sær at nevna tað fyri teimum.

Á skipasmiðjuni váttaðu tey, at kravið var komið og at hetta var eitt krav, sum tey tóku í størsta álvara.

Spanska skipasmiðjan hevur fingið eina hoyringsfreist uppá tveir mánaðir. Tað merkir, at skipasmiðjan skal siga sína hugsan seinnapartin í juli og so verur málið viðgjørt víðari haðani.

Men tey væntaðu avgjørt ikki, at hetta fór at fáa nakrar sum helst avleiðingar fyri nýggja Smyril.

Tó fekk stjórin á Strandferðsluni onga trygd heim aftur við sær.

Men nakra trygd fekk hann kortini ikki.

– Spurningurin er, hvussu verður, skuldi tað ringasta hent og skipasmiðjan fer í gjaldssteðg. Men vit hava onga um helst ábending um, at tað fer at henda.

# Ferjulegan í Suðuroy liðug tá ið nýggi Smyril kemur

**Nýggi Smyril verður seinkaður í tríggjar vikur og sostatt fer tað at eydnast at gera ferjuleguna í Trongisvági lidna til hann kemur**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Arbeiðið uppá nýggju samferðsluhavnina íTrongisvági er komið rættiliga væl áleiðis og tað hevur gingið so væl, at ferjuleganverður liðug, tá ið nýggi Smyril kemur*

*Myndina tók Leivur Nygaard*

Tað er ikki bara ringt, at nýggi Smyril verður seinkaður í slakar tríggjar vikur. Í hvussu so er kemur hetta ikki illa við hjá teimum, sum gera nýggju samferðsluhavnina í Trongisvági.

Støðan er als ikki tann at tey á Articon, sum gera ferjuleguna, fegnast um, at skipið er seinkað.

Men tað skerst ikki burtur, at tíðarætlanin, tey hava at gera ferjuleguna eftir, hevur verið ógvuliga knøpp.

Men hinvegin hevur arbeiðið at gera ferjuleguna, gingið ógvuliga væl.

Tað hevur gingið so væl, at nú nýggi Smyril er seinkaður til 30. oktober, fer tað at eydnast at gera ferjuleguna lidna, til hann kemur.

– Sum tað gongur nú, og nýggi Smyril er seinkaður í næstan tríggjar vikur, dugi eg ikki at síggja annað, enn at ferjulegan verður liðug, tá ið skipið kemur, sigur Jákup Enni hjá Articon, sum er ein av teimum, sum stendur fyri arbeiðnum upp á ferjuleguna.

– Tað dugi eg ikki at síggja nakra forðing fyri, sum tað gongur nú, sigur hann.

Hann sigur, at sum tað gongur nú, verður tað klárt hjá Landsverkfrøðinginum at asfaltera økið seint í summar og tað verður onki í vegin fyri at ferjulegan verður liðug 30. oktober.

Eftir tíðarætlanini skuldi ferjulegan annars verið liðug 15. november, men tað hevur gingið so mikið væl, at sum tað nú sær út, verður hon liðug tá ið Smyril kemur.

Jákup Enni sigur, at teir hava gjørt av at arbeiða við fullari megi í alt summar, uttan at fara í summarfrí, fyri at tað skal eydnast og tað ivast hann ikki í at tað fer at gera, sum tað nú sær út.

### Koyringin nógv minkað

Tey sum hava koyrt eftir landsvegin inn ígjøgnum dalin hesar seinastu dagarnar, hava lagt til merkis, at koyringin við grótið við teimum stóru lastbilunum, er rættiliga nógv minkað.

Men tað hevur eisini sína natúrligu frágreiðing

– Vit eru liðug at koyra grót til ferjuleguna, sigur Jàkup Enni.

Hann sigur, at tað, sum nú er eftir at koyra, er skervur til at leggja omaná ferjuleguna, áðrenn hon verður asfaltera og tann skervin eru teir í ferð við at knúsa nú.

Samstundis skulu teir leggja tað stóra grótið framvið molanum.

Men alt hetta fer at føra nógv minni koyring við sær, enn tað hevur verið.

– Vit hava brúkt sjey lastbilar, men hereftir koma vit ikki at brúka meiri enn einar tríggjar, tí nøgdirnar eru ikki so stórar, sigur Jákup Enni.

Sostatt er tann tunga ferðslan eftir landsvegnum, minkað munandi. Og nú koyringin er við at vera liðug, staðfestir Jákup Enni, at tað hevur gingið nógv betri enn væntað.

– Stúrt var fyri stórum trupulleikum í sambandi við koyringini, men tað hevur als ikki verið. Onkrir smávegis trupulleikar vóru í fyrstuni, men sum heild hevur tað gingið nógv lagaligari enn væntað, leggur hann afturat.



# Ljósafelli elligamalt vrak í trolið

**Á seinasta túrinum fekk trolarin, Ljósafelli, vrakrestir av einum elligomlum skipi í trolið. Seymirnir vóru ávikavist úr træi og kopari**

FEKK VRAK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*– Tað hevði verið áhugavert at fingið eina ábending, hvaðani hetta skipið stavar, heldur Jói Winther.*

*Myndir: Jens Kr. Vang*

Nógv skip eru burturgingin upp ígjøgnum tíðirnar, og nógv loyndarmál og nógvir spurningar eru knýtt at fleiri av hesum hendingum – ikki minst í teimum førum, har eingin spurdist aftur, og eingi spor vóru at fylgja.

### Elligamalt vrak

Á seinasta túrinum á leiðini við Flemmish Kap – ella í øki 3L, sum er hellingin innanfyri Flemmish Kap, fekk trolarin, Ljósafelli, partar av einum elligomlum skipsvraki í trolið.

Jói Winther, ið hendan túrin var við Ljósafelli sum eftirlitsmaður fyri NAFO, sigur, at talan er um partar av einum elligomlum vraki, sum helst í sínari tíð hevur verið eitt hampiliga stórt skip.

Hann sigur, at seymirnir, sum eru at síggja í vrakinum, eru ávikavist úr træi og úr kopari.

– Tað vísir seg, at teir smærru seymirnir eru úr træi og teir longu, sum helst skulu bera meira, eru úr kopari.

Jói sigur, at skip hava ligið á leiðini, har Ljósafelli fekk vrakrestirnar, í fleiri ár.

– Eg haldi tí, at vit munnu hava grivið hesar plankarnar upp úr botninum, har teir hugsandi hava ligið fjaldir í mong ár.

### Lítil áhugi

Vrakrestirnar hava nú ligið umborð á Ljósafelli í ein mánaða ella so.

– Tá ið vit komu aftur av túri, boðaðu vit Fornminnissavninum frá tí, vit høvdu fingið. Ein maður hevur verið framvið her og hevur hugt at vrakinum, men eg haldi ikki, teir hava víst hesum nakran serligan áhuga.

Jói heldur, at tað hevði verið ógvuliga áhugavert at funnið út av, hvat skip talan kann vera um – ella í minsta lagi, nær í tíðini skipið er burturgingið.

Hann sigur, at skipið, sum vrakrestirnar stava frá, at síggja til hevur verið styrkt við kóparplátum ímóti ísi.

– Tí er hugsandi, at skipið hevur verið styrkt til sigling í kaldari sjógvi, har ísur kundi vera ein trupulleiki. Tað er kent, at tann tunni ísurin kann skera inn í skipssíðuna, og tí plagdu teir at styrkja bógvin og tann partin av skipsskrokkinum, sum lá um vatngangin.

### Okkara skylda

Jói heldur, at soleiðis, sum skipið sær út til at vera bygt, kann tað saktans vera eini 200 ára gamalt ella eldri.

– Men tað kann sjálvsagt eisini vera yngri enn tað, leggur hann aftrat.

Tað harmar Jóa, at Fornminnissavnið ella annar stovnur ikki hevur áhuga at gera nakrar serligar kanningar av vrakrestunum.

– Tað var eg, sum ringdi og segði teimum frá. Tey søgdu, at til ber at gera kanningar, men hetta er bæði tíðarkrevjandi og kostnaðarmikið. Ætlandi fara vit avstað aftur seinni í hesi vikuni, og tá verða vrakrestirnar, sum nú hava ligið umborð á Ljósafelli í ein mánaða ella so, helst koyrdar niðan á Sandvíkarhjalla.

Jói heldur, tað er okkara skylda mótivegis okkum sjálvum og øðrum at kanna, hvaðani eitt slíkt skip, sum í sínari tíð er gingið burtur, stavar.

– Eg hevði heilt avgjørt væntað, at onkur fór at taka sær av hesum.

### Langt av leið

Hann sigur, at skuldi tað hent seg, at talan var um eitt føroyskt skip, hevði skipið í sínari tíð verið rikið langt av leið.

Tó útihýsir hann ikki møguleikanum, at deyðsiglari, sum hevur fiskað í Grønlandi, kann vera rikin á hesar leiðir.

– Tá ið eingin áhugi er at taka hond um slíkt, er ikki hugsandi, at fólk heldur tíma at goyma tað, tey nú einaferð kunnu koma fram á – tað veri seg á landi ella sjógvi, sigur Jói Winther.

Ljósafelli fór úr Føroyum, 16. februar og var aftur í Føroyum, 15. mai. Veiðan vá 160 tons av svartkalva, harav meginparturin av veiðini var skorin til japanska marknaðin. Eisini hava teir heilfryst nakað av svartkalva, sum bara er blóðgaður.